## Scolari styttir feriuna

Spælararnir í Chelsea hava fingið boð um, at teir skulu møta til venjing eina viku fyrr, enn ætlanin var, tá teir fóru í summarferiu. Nýggi venjarin hjá Chelsea, Luis Felipe Scolari, er so spentur til at fara í gongd við venjingina, at hann ætlar at byrja tann 7. juli. Spælararnir høvdu annars fingið frí til 14. Juli, men nú mugu teir avlýsa seinastu vikuna av feriuni.



## Walcott verður nummar 14

Ungi framherjin Theo Walcott fær eitt tiltikið nummar á sína troyggju í Arsenal, tá kappingin byrajr aftur. Walcott skal nevniliga spæla í nummar 14, og tað er gamla nummarið hjá Thierry Henry. Henry skoraði heili 226 mál fyri Arsenal við nummar 14 á bakinum, so Walcott hevur nógv at liva upp til. Walcott hevur ikki heilt livað upp til vónirnar, síðani hann skifti til Arsenal í 2006.

Elfsborg-HB 0-0

# Altjóða stig til HB

**Elfsborg spenti ikki bogan ov nógv, men HB sýndi eisini munandi betri spæl enn fyri viku síðani, tá teir komu aftur við málleysum javnleiki**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir 4-1 sigur til sviarnar í fyrra dystinum var spenningurin burtur, tá HB leygardagin spældi seinna Intertoto-dystin móti Elfsborg. Men tað forðaði ikki HB í at levera eitt av betru avrikum sínum seinastu vikurnar.

Á spildurnýggja graslíkinum í Borås Arena hevði HB eitt útgangsstøði, ið var nakað nógv varligari, enn tað var í heimadystinum. Setningurin var heilt greitt at halda sviunum frá teimum stóru málmøguleikunum, og fyri tað nógva eydnaðist ehtta eisini. Móti dystarenda hevði HB eisini einstakar vandamiklar kontraatsóknir, hóast teir hesa løtuna spældu undirmannaðir, eftir at Kári Nielsen tvær ferðir hevði fingið gula kortið frá dómaranum.

### Hálvum misnøgdur

Eftir dystin hevði Rás2 orðið á Jákup á Borg, og hann var væl nøgdur um avrikið, sum HB sýndi í dystinum.

- Í verjupartinum stóðu vit okkum sera væl. Serliga í fyrra hálvleiki, har teir einans hava onkrar deyðbóltar. Og vit hava eisini okkara møguleikar, sum allir komu í opnum spæli.

- Eg veit ikki, um eg skal siga, at eg eri ónøgdur, men tað er eitt sindur løgið at hava spælt á útivølli í Europa, og so vera hálvgum misnøgdur um úrslitið.

Um ávirkanina, sum dysturin kann hava á HB, helt Jákup, at hetta kann ávirka rætta vegin.

- Nú eru vit langt aftan fyri EB/Streym á stigatalvuni, so teir hugsa vit ikki um enn. Men eg haldi, at avrikini seinsatu tíðina hava verið betri. Vit hava verið meira disciplineraði í spælinum, og har eru fleiri lutir, sum venda rætta vegin. Enn er tó langt eftir á mál, áðrenn vit kunnu verða nøgdir, so lat okkum nú síggja, hvussu leikur fer. Men hetta er í øllum førum eitt stórt fet rætta vegin, segði Jákup á Borg eftir dystin.

# Tveir málverjar beinbrotnir av vølli

**Botnliðið EB/Streymur var á odda ímóti nýggja oddaliðnum, inntil Gunnar á Steig var farin av vøllinum við brotnari hond, og seinni noyddist avloysarin av vøllinum við skaða í beininum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við trivaligum 5-1 sigri á útivølli ímóti EB/Streymi lyfti 07 Vestur seg upp á fremsta plássið í 1. deild. Oddasessurin varð tryggjaður, tí VB/Sumba tapti 2-1 á Argjum. Harvið hava 07 Vestur og VB/Sumba sama stigatal, men málmunurin hjá 07 Vestur er betri, enn hann er hjá VB/Sumba.

Men satt at siga var tað lítið Formuladeildarsnitt yvir tí, tá ið nýggja oddaliðið hitti teir næstbestu hjá EB/Streymi, sum stríðast fyri at sleppa undan botnplássunum.

EB/Streymur var á odda við einum máli eftir 1. hálvleik. Niels Pauli Danielsen skoraði málið, tá ið hann við fremra stólpa møtti innleggi úr høgru frá Jens Mikal Jensen, og um EB/Streymur kundi havt økt um leiðsluna bæði eina og tvær ferðir, men teir vóru ikki nóg neyvir í góðum støðum.

Tveir minuttir undan steðginum var EB/Streyma málverjin Gunnar á Steig so óheppin at bróta hondina í samanstoyti við mótstøðumann. Ási Dam, sum er unglingur og plagar at vera í álopinum, fór at verja málið. Men bara í eina lítla løtu. Tíðliga í 2. hálvleiki noyddist hann av vøllinum, tí hann var skaddur í beininum. Tað var tá ið hann varð skaddur, at 07 Vestur javnaði.

So fór Vinjard Dam at verja málið. Hann helt tætt í tólv minuttir. Tá ið hann hálvbjargaði frísparksroynd, og Jón Nielsen, sum er fluttur av Argjum og vestur aftur í Vágar, skoraði til 2-1, var greitt, at 07 Vestur fór at vinna. Men leingi var tað ikki sannførandi. Silva økti til 3-1 við stútara eftir fríspark, og so skoraði Tór-Ingar Akselsen tvey mál, so sigurin at enda gjørdist trivaligur.

### Oddurin tódnaði

Oddaliðið VB/Sumba tapti tøttu oddauppgerðina á Argjum 2-1. Gestirnir løgdu bragdligari fyri, og teir kundu verið komnir á odda eitt nú, tá ið Pól Thorsteinsson royndi seg úr stuttari fjarstøðu, og Heðin Stenberg vardi væl fyri.

Miðskeiðis í 1. hálvleiki legði Kenneth Jacobsen AB framum. Hann var leysur mitt fyri, eftir at Thomas Hans Rubeksen hevði lagt innfyri úr høgru. Tíðliga í 2. hálvleiki økti Dion Splidt um AB leiðsluna. Hann var leysur aftanfyri handara stólpa, eftir at Evrard Ble hevði lagt innfyri úr høgru.

Miðskeiðis í 2. hálvleiki kom spenningur í aftur, eftir at Jón K. Poulsen hevði minkað um munin við skoti, sum umvegis stólpan brast í netmeskarnar. AB megnaði tó at halda tætt, og tað hevði stóran týdning fyri teirra vánir í toppstríðnum.

TB tapti fyrr í ár púra óvæntað 1-0 í Leirvík. Tá ið Víkingur leygardagin vitjaði á Sevmýri var tó eingin ivi. Heimaliðið var greitt omaná og vann 5-1. Tað var ikki fyrrenn í síðstu løtu, at Finnur Justinussen við stútara eftir frísparksinnlegg frá Bárði Hansen pyntaði um fyri Víking.

Botnliðið B68 tóktist vera á veg ímóti øllum stigunum, tá ið NSÍ fríggjakvøldið vitjaði á Svangaskarði. Súni Fríði Barbá hevði eftir innlegg úr høgru frá Emil Olsen lagt heimaliðið framum, og Gestur Lómstein hevði eftir horna økt um leiðsluna.

Tveir minuttir undan leikloki minkaði Sonni L. Petersen um munin eftir skjótálop, og síðsta atsóknin av øllum var tað, tá ið Pól Jóhannus Justinussen við høvdinum umsetti frísparksframlegging frá Kára Hansen til 2-2!

HB skuldi havt vitjað í Klaksvík, men dysturin varð útsettur orsaka av Intertoto Cup ferðini hjá HB.

